# Politikararnir lurta ikki

Formaðurin í grønlendska fiskivinnuráðnum, Jens K. Lyberth, fýlist á, at Finn Karlsen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, hevur ásett nýggjar kvotur og latið fiskirættindi uttan at ráðføra seg við ráðið. Hann fýlist eisini á, at landsstýrismaðurin als ikki lurtar eftir teimum ráðum, sum landstýrið fær. Eitt nú mæltu fiskifrøðingarnir til at skarva 30 prosent av rækjukvotuni, vinnan mælti til 10 prosent yvir trý ár, men úrslitið gjørdist fimm prosent.



*Grønlendska landsstýrið lurtar ikki eftir fiskivinnuráðnum (Mynd: KNR)*

# Geir og Gordon á fund

Hósdagin fer íslendski forsætisráðharrin, Geir H. Hararde, at tosa við bretska starvsbróður sín, Gordon Brown, um ymisk mál av felags áhuga. Fundurin verður í London, men fyrst skal Geir hitta formannin í konserativa andstøðuflokkinum, David Cameron. Forsætismálaráðið í Reykjavík sigur, at forsætisráðharrin fer at tosa við teir báðar bretsku politikararnar støðuna á altjóða fíggjarmarknaðinum og um trygdar- og orkumál.



*- Vit hava onga áheitan fingið frá Faroe Seafood um at seta pening í virksemið. Mær dámar ikki samantvinningina millum virkir og skip, sigur Harry Benjaminsen, sum arbeiðir hjá Faroe Seafood á Toftum, samstundis sum hann er formaður í Tofta Arbeiðarafelag*

Mynd: Vilmund Jacobsen



*- Vit eru ikki óttafullar um støðuna, men tað er greitt, at vit hugsa um, hvussu framtíðin verður, nú fíggjarliga støðan hjá felagnum er so spent, siga kvinnurnar, sum Sosialurin hitti á bryggjuni á Toftum í morgun*

Mynd: Vilmund Jacobsen

øðrvísi enn á fiskinum, sum vit plaga at arbeiða undan Føroyum, men tað er ikki vist, at hetta hevur nakran týdning fyri lidnu framleiðsluna.

Aldi toskurin úr Hetlandi er sum stórur smáfiskur á at líta.

### Útlendsk arbeiðsmegi

Harry Johannesen sigur, at tey, sum arbeiða hjá Faroe Seafood, mangan hava undrað seg yvir alt kjakið um, at føroysku fiskavirkjunum tørvar so nógva arbeiðsmegi.

- Henda umrøða tykir okkum mangan løgin, tí her á Toftum hava vit, tá ið árið er úti, ikki fingið nóg mikið av tímum til eina hampiliga ársinntøku.

Hann vísir á, at kona hansara neyvan tjenti stórt meira enn 100.000 krónur alt seinasta ár.

- Eg sigi ikki, at støðan á øðrum virkjum hjá felagnum kring landið ikki kann vera øðrvísi, men á virkinum hjá Faroe Seafood á Toftum hevur trupulleikin heldur verið, at okkum vantar arbeiði fyri at hava eina hampiliga inntøku, sigur Harry Johannesen.

# Kringvarpið broytir skap

**Nýggi stjórin í Kringvarpinum, Annika Mittún Jacobsen, hevur lagt uppskot til bygnaðarbroytingar fram fyri deildarleiðarnar og starvsfólkið í Kringvarpinum. Almenna varpið skal hava færri leiðarar og opnari deildir**

MIÐLAR

*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Annikka Mittún Jacobsen hevur bara verið góðar tvær vikur í starvinum sum stjóri í Kringvarpi Føroya, men hon er farin beint í gongd við at fyrireika umskipanir av stovninum.

Sambært keldum í Kringvarpinum hevur nýggi stjórin lagt fram uppskot um bygnaðarbroytingar, sum bróta niður mørk millum deildir, og gevur stovninum færri leiðarar.

Men sambært Anniku Mittún Jacobsen, stjóra, er talan bert um upplegg til innanhýsis kjak. Hon hevur ikki avgjørt nakað enn, men vil samskifta við starvsfólki um at finna bestu loysnina.

- Vit hava tosað um, hvussu Kringvarpið skal skipast. Fíggjarætlanin hjá stovninum er kroyst, og vit hava brúk fyri at fáa meira fyri pengarnar. Vit hava nøkur ósett størv, men tey verða ikki sett í ár. Og so kanna vit, um tað ber til at fáa eitt bíligari útvarp.



*Anikka Mittún Jacobsen, stjóri í Kringvarp Føroya*

# Fiskiørnin á Hálsavøtnum

**- Fiskiørn hoyrir til bólkin av rovfuglum, men livir næstan 100% av fiski. Hon er tí ikki til vanda fyri høsn, dunnur, gæs og heiðafugl annars, sigur Jens Kjeld-Jensen**

FUGLUR



*Fiskiørnin, sum seinastu tíðina hevur hildið til við Hálsavøtnini á Sandoynni*

Mynd: Jóan Petur Petersen

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinastu tíðina hevur ein fiskiørn hildið til við Hálsavøtnini á Sandoynni.

Jóan Petur Petersen hevur verið heppin og hevur tikið fleiri góðar myndir av ørnini.

Jens Kjeld-Jensen, fuglafrøðingur, sigur, at fiskiørn er skrásett at vera sædd í Føroyum einar 14-15 ferðir síðan í 1800-talinum, men hugsandi er, at aðrar eru sæddar gjøgnum tíðirnar, sum ikki eru skrásettar.

Fuglafrøðingurin vísir á, at síðan 1950 eru 10 fiskiørnir skrásettar at vera sæddar í Føroyum.

- Fuglurin byggir reiðir í eitt nú Skotlandi, men flytir síðan suðureftir, tá ið heystið kemur og er burtur um veturin.

Um veturin heldur fuglurin til í eitt nú Afriku og Suðurameriku.

Jens Kjeld-Jensen sigur, at tvær av fiskiørnunum, sum skrásettar eru í Føroyum, vóru ringmerktar í Svøríki.

### Eingin vandi

- Ørnin hoyrir til bólkin av rovfuglum, men livir næstan 100% av fiski. Fiskiørnin í Sandoynni er tí ikki til vanda fyri høsn, dunnur, gæs og heiðafugl annars.

Hann sigur, at tað er bara ein spurningur um tíð, nær fuglurin flýgur burtur aftur.

- Eg havi skilt á fólki, at fiskiørnin hevur tikið síl á vatninum, og ivaleyst man hon hava fingið mettuna hesar dagarnar. Annars hevði hon longu verið rýmd, sigur fuglafrøðingurin.

Fiskiørn er nógv minni enn eitt nú havørn, sum eisini er sædd í Føroyum gjøgnum tíðirnar, men ikki so ofta sum fyrrnevnda.

### Ein meistari

Fiskiørnin er ein meistari í at veiða fisk. Vanliga hongur fuglurin stillur í luftini, einar 25 metrar yvir vatnflatuni. Hon sær væl, og tá hon fær eyga á ein fisk, stoytir hon seg niður. Í evstu løtu, áðrenn hon rakar vatnið ella sjógvin, leggur hon veingjarnar aftrat kroppinum og kavar.

Sagt verður um fuglin, at hann serliga tekur fisk, sum liggur um einar 20-40 sentimetrar, men fiskiørnin kann eisini taka fisk, sum er størri enn hetta.